

Myndir: CoastZone

# Føroyskt adrenalinsjokk til flatar danskarar



rogvi@sosialurin.fo

Rógvi Nybo

– Tit eiga ikki bara eina fantastiska náttúru, men eisini heimsins besta kova. So hetta er eitt paradís fyri fólk, ið vilja hava ekstremar avbjóðingar, sigur Brian Christiansen frá donsku fyritøkuni CoastZone, sum herfyri bjóðaði føroysku náttúruni av saman við 135 donskum KT-serfrøðingum

Skitin og tvitin, kikkandi eftir ondini, standa 15 danskir KT-serfrøðingar, harav flestu teirra eru konufólk, við eini rætt og stara, meðan bóndin fær seyðin til høldar. Í ein heilan tíma hava tey tuskað runt eftir eini lítlari gongu í eini desperatari roynd at reka seyðin í rætt fyri at geva honum medisin.

Men tey hava ikki so mikið sum fingið eina ullarlagd í rætt og mugu geva upp. Fáar minuttir og nøkur bríksl seinni hevur bóndin við hundum sínum fingið allan seyðin í rættina og stendur klárur við medisininum.

Danirnir eru mállleysir. Standa bara og tiva, meðan teir býttisliga stara eftir hvørjum øðrum, um tað teir júst hava sæð.

– Tá tú veruliga skal uppliva nakað, so er tað ikki nokk at síggja tað. Tú skalt royna tað. Hetta sigur Brian Christiansen frá donsku adventure fyritøkuni CoastZone.

– Um vit tóku hesi fólkini út og vístu teimum ein bónda, ið rekur seyðin í rætt, so høvdu tey nikkað høviskliga, og sagt, at tað var spennandi, uttan veruliga at halda tað. Tá tú í staðin letur tey royna tað sjálvi, uppliva tey, hvussu torført tað í veruleikanum er. Tá tey so aftan á síggja bóndan gera tað við einans tveimum hundum, fáa tey eitt heilt annað upplivilsi og stóra virðing fyri tí, greiðir hann frá.

### Sterkasta upplivingin

CoastZone er ein donsk fyritøka, ið skipar fyri eventum og teambuilding. Hetta ger hon við at bjóða fólkum og fyritøkum tær villastu upplivingarnar, náttúran hevur at bjóða. Ikki bara í Føroyum, men allastaðni í heiminum. Fjallaklintring, síging, watercast, hæddarlop, seyðarakstur og sightseeing eru millum upplivingarnar, fyritøkan bjóðar í Føroyum.

Rákið hitti Brian Christiansen og Thomas Liebe, ið báðir eru fyriskiparar og eigarar í fyritøkuni. Teir síggja troyttir út, tá vit vit sita við morgunborðið á Hotel Føroyum og njóta útsýnið yvir Havnina í morgunsólini.

Teir hava júst verið vertir fyri einum bólki av 135 KT-serfrøðingum frá donsku fyritøkuni 7N, har teir hava givið teimum tær sterkastu upplivingarnar, tú kanst ímynda tær í føroysku